# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 10. juni 2021
Mál nr.: 21/08868
Málsviðgjørt: EC

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

| **Kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan** | **Kunngerðaruppskotið** |
|---|---|
| **§ 21.** Fyri roknskapir har móttakarin av stuðlinum er fevndur av § 2 í kunngerð um roknskaparverk landsins, galda reglurnar í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald, um tað ikki í aðrari lóg eru ásettar reglur, sum víkja frá hesum, sbrt. § 2, stk. 2 og 3 í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald.<br>*Stk. 2.* Er roknskapurin ikki fevndur av stk. 1, skal hann gerast sambært reglunum í nr. 1 til 4, sbr. tó stk. 3. Roknskapurin skal:<br>1) Fylgja eini ásettari kontuskipan, sum skal verða liðað sundur í slag og/ella endamál.<br>2) Hava stuðulin tiknan við sum inntøka.<br>3) Roknskapurin skal fevna um rakstrarroknskap, sum vísir allar inntøkur og útreiðslur greinaðar sambært kontuskipanini. Vístar skulu vera avskrivingar og burturleggingar. Tað skal verða gjørd ein fíggjarstøða, sum vísir ogn, skuld og eginogn.<br>4) Innihalda eina frágreiðing um, hvussu stuðulin er nýttur.<br>Stk. 3. Er talan um stuðul, sum bert verður veittur ta einu ferðina, og hesin er minni enn 100 tús. kr., kann ístaðin fyri roknskap, verða gjørd ein frágreiðing. | |

| | |
|---|---|
| | *Stk. 4.* Stuðulsmóttakarin skal í seinasta lagi 1. apríl árið eftir lata stuðulsveitaranum roknskap sbrt. stk. 2 við møguligari váttan frá grannskoðara, sbr. § 22, stk. 2-3, og grannskoðanarprotokoll. Er talan um frágreiðing sbrt. stk. 3, skal frágreiðing latast stuðulsveitaranum í seinasta lagi 1. apríl árið eftir. |
| **§ 22**. Er talan um roknskap fyri stuðul, sum er fevndur av §§ 7 og 8 í løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum, verður hesin grannskoðaður sambært ásettu reglunum av Landsgrannskoðanini, ella góðkendum grannskoðara, sbrt. løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, uttan so at tað í aðrari lóg eru ásettar reglur, sum víkja frá hesum.<br>*Stk. 2.* Roknskapur fyri stuðul, sum ikki eru fevndur av stk. 1, verður grannskoðaður av góðkendum grannskoðara sambært hesum reglum, sbr. tó stk. 3:<br>1) Grannskoðanin verður útint sambært góðum grannskoðanarsiði.<br>2) Undir grannskoðanini skal verða kannað um roknskapurin er rættur, og um tær atgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði. Harumframt verður kannað, um stuðulsmóttakarin lýkir tær treytir, sum stuðulsmyndugleikin hevur sett, um stuðulin er brúktur til ætlaða endamálið, og um stuðulsmóttakarin hevur borið seg hóskandi at fíggjarliga.<br>3) Stuðulsmóttakarin skal geva grannskoðaranum tær upplýsingar, sum grannskoðarin heldur hava týdning fyri at meta um roknskapin, og skal geva grannskoðaranum atgongd til at gera tær kanningar, sum grannskoðarin metir vera neyðugar, og skal syrgja fyri, at grannskoðarin fær tær upplýsingar og ta hjálp, sum grannskoðarin metir vera neyðugar fyri at kunna gera sítt arbeiði.<br>4) Verður grannskoðarin varugur við lógarbrot, skal grannskoðarin beinanvegin geva stuðulsmóttakaranum boð um hetta, og síggja til, at stuðulsmóttakarin innan 3 vikur gevur stuðulsveitara boðini. Um hetta ikki | *Stk. 2.* Roknskapur fyri stuðul, sum ikki eru fevndur av stk. 1, verður váttaður við grannskoðanarátekning sbrt. §§ 3-8 í kunngerð um grannskoðaraváttanir o.a., sbr. tó stk. 3. |

| | |
|---|---|
| verður gjørt, skal grannskoðarin boða stuðulsveitara frá hesum.<br>5) Grannskoðarin førir grannskoðanarprotokoll, har grannskoðarin greiðir frá gjørdum grannskoðanararbeiði umframt øllum munandi viðurskiftum, sum hava givið høvi til viðmerkingar. Somuleiðis verða upplýsingar um serlig eftirlitsarbeiði, serligar frágreiðingar, ráðgeving og hjálp førdar í grannskoðanarprotokollina.<br>6) Grannskoðaði roknskapurin fær eina átekning, sum vísir, at roknskapurin er grannskoðaður sambært hesum reglum. Fyrivarni skulu síggjast í átekningini.<br>7) Stuðulsmóttakarin skal í seinasta lagi 1. apríl árið eftir lata stuðulsveitaranum avrit av grannskoðanarprotokollini saman við áteknaða ársroknskapinum.<br>*Stk. 3.* Er talan um stuðul, sum bert verður veittur ta einu ferðina, og hesin er minni enn 100 tús. kr., verður krav ikki sett um grannskoðan, sbr. § 21, stk. 3. | <br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br><br>*Stk. 3.* Er talan um stuðul, sum er minni enn 500 tús. kr., kann við roknskapi, sum er fevndur av stk. 2, verða latin váttan um víðkaða gjøgnumgongd sbrt. §§ 9-11 í kunngerð um grannskoðaravváttanir o.a. Er talan um stuðul, sum er minni enn 100 tús. kr., verður krav ikki sett um váttan frá góðkendum grannskoðara. |